



# Slankiwraps

So upprann løtan, har eg skuldi royna tað forvitnisligu nýggju viðgerðina, sum garanterar 15 centimetrar av kroppinum eftir fyrstu viðgerð. Ikki tykkum at siga, so var eg heldur skeptisk um hesa viðgerð.

Eg varð innballað í eitt slag av bandagu um allan kroppin, sum var vátt við leiri. Síðani setti eg meg niður í ein hita stól, og væl innballað í teppir og annað, soleiðis at eg varð heit. Endamálið við hesum er, at leirið skal sleppa inn í kroppin. Síðani, skuldi eg sita har í ein tíma.

Aftaná hendan tíman, skuldi eg so upp at mátast aftur. Við einum BMI tali undir miðal, er tað sjálvandi ivasamt, hvussu nógvir centimetrar í roynd og veru kunnu fara av, men úrslitið gjørdi meg ikki sørt bilsna. 20.8 centimetrar !

So stórt var talið, sum eg seinni kundi reypa mær av, var farið av kroppinum hjá mær.

Nakað var farið av mjødnini og reyvini, okkurt av lørunum og okkurt av miðjuni. Eisini fór okkurt av armunum.

So staðfestast kann, at hendan viðgerðin riggar. Enntá betur enn lovað !

# Lift6 andlitsviðgerð

Hendan andlitsviðgerðin minnir um Lipomassaguna, har tað eisini er ein "súgvukoppur", sum verður settur á andlitið.

Stóru munurin er tó tann, at hesi viðgerð ført tú ikki ilt av. Hendan viðgerðin er ógvuliga avslappandi, og andlitið kennist sum nýtt eftir viðgerðina.

Sum vanligt er, varð helvtina av andlitinum gjørt fyrst, soleiðis, at munur kundi síggjast á úrslitinum beinan vegin. Her er at siga, at viðgerðin í størsta mun hevur til uppgávu at minka um rukkur og linjur, og annars at lyfta andlitið á natúrligan hátt, soleiðis, at ein sær yngri út.



Og verandi bert 23 ár, so kann tað sjálvandi verða rættiliga trupult at minka um linjur og rukkur hjá mær. Men hóast tað, so er ein sjónligur munur á úrslitinum.

Við kjálkan og munnin er ein munur at síggja. Á øðrum myndum á síðuni er eisini týðuligur munur á andlitinum hjá kvinnunum, sum hava roynt hesa viðgerð.

## Viðgerð við úrsliti

Alt í alt má staðfestast, at viðgerðin var góð og gav úrslit. Tó hevði hon helst givið størri úrslit hjá onkrum, sum hevur størri tørv á slíkum viðgerðum, men eg eri væl nøgd, og kann avgjørt viðmæla hetta til kvinnur, sum vilja "lide for skønheden".



## Hvussu riggar tað?

UCW Slankiwrap kemur frá London og er ein slankandi, uppstrammandi og útreinsandi viðgerð. Tú verður ballað inn í heitar leirbandagur ( leirið kemur frá deyðhavinum og er tilsett eina rúgvu av salti og minerali), hitin frá leirinum fær porurnar at lata seg upp, so leirið kann treingja inn.

*Hvussu leingi heldur tað?*
Tað heldur í okkurt um ein mánað.

*Er tað ikki bara vatn, sum fer av?*
Í mun til aðrar líknandi viðgerðir, so er tað ikki vatn, sum fer av í hesi viðgerðini. Viðmælt verður, at ein drekkur nógv vatn áðrenn og eftir viðgerðina. Tað, sum fer av, at í høvuðsheitum affaldsstoffir.

*Hvat kostar tað?*
Ein viðgerð av slankiwrap kostar 950 krónur, og avsláttur verður latin, um fleiri viðgerðir verða bílagdar samstundis.
Annars kann lesast meira á ergo.fo